Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**ÍtróttarSosialurin kann eisini lesast á alnótini: www.sosialurin.fo**

# Kí tryggjar sær nú framtíðina

*Kí hevur seinastu tíðina gjørt sáttmála við ikki færri enn 6 unglingaleikarar, soleiðis at felagið eisini í framtíðini kann varveita oddastøðuna í føroyskum fótbólti*

JÁKUP MØRK

Í seinastu viku visti Norðlýsið at siga frá, at KÍ hevur gjørt sáttmála við 17 ára gamla unglingamálverjan, Carsten Joensen.



*Carsten, v.m., saman við Svend Jacobsen, formanni í KÍ*
***Mynd: Norðlýsi***

Tey, sum hava sæð Carsten vart málið í ungdómsdeildunum hjá KÍ, munnu helst vera á einum máli um, at her er talan um ein leikara við framúr góðum evnum. Hetta sæst eisini aftur í, at hann higartil hevur umboðað Føroyar heili 21 ferðir í landsliðshøpi, og millum annað var hann longu sum 14 ára gamal at síggja á U-16 landsliðið okkara.

Frammanundan hevur Klaksvíkin eisini fostrað nógvar góðar málmenn, og fremstur av hesum man helst vera núverandi landsliðsmálverji okkara, Jákup Mikkelsen.

**Ungdómsarbeiði ber ávøkst**
Svend Jacobsen, formaður í KÍ, sigur við Sosialin, hetta er ein liður í langtíðararbeiðinum hjá KÍ. Stutt fyri jól skrivaði felagið eisini sáttmála við fimm aðrar unglingaleikarar, og eru hesir, eins og Carsten, nú sáttmálabundnir at felagnum tey bæði komandi árini.

Teir fimm, sum felagið skrivaði sáttmála við tá, eru; Christian á Lakjuni, Rógvi Laksáfoss, Atli Danielsen, Hjalgrím Eltør Jacobsen og Símun Joensen. Hesir eru allir útileikarar, og við eitt sindur av ættargransking sæst eisini, at talan her er um fleiri væl kend nøvn í fótbóltshøpi, og hvør veit, um ikki hesir ungu leikarar koma at mynda føroyskan fyrstudeildarfótbólt í framtíðini.

Kanska liggur henda framtíð heldur ikki so langt burturi, tí í Klaksvíkini hava teir ofta borið orð fyri at nýtt nógvar ungar leikarar, og besta dømi um hetta man helst vera liðið, sum í 1991 gjørdist føroyameistarar, hóast stórur partur av leikarunum enn hevði aldur til at leika í unglingadeildini.

Hetta er fyrstu ferð, at KÍ ger sáttmála við somikið ungar leikarar, og Svend leggur afturat, at hetta so at siga eru fyrstu fruktirnar, sum verða heystaðar av tí ungdómsarbeiði, sum felagið hevur framt seinnu árini, og sum byrjaði, tá Annfinn Danielsen fyri trimum árum síðani varð settur at skipað ungdómsvenjingarnar í Klaksvík.

**Eru byrjaðir**
Besta mansliðið har norðuri er so smátt farið undir venjingarnar, og hóast nýggi venjarin, Tomislav Sivic, ikki kemur til landið fyrr enn seinast í hesum mánaðinum, so verður vant tvær ferðir um vikuna.

Sum vera man, so eru Klaksvíkingar rættuliga spentir, nú tað aftur stundar til fótbóltin, og spenningurin man helst ikki vera minni eftir góðu avrikini í 1999.

Um tað so eydnast teimum at endurvinna meistaraheitið, ella um steypið má latast øðrum felag í varveitslu, fæst at vita um góðar 9 mánaðir.

# Jarnbardur til Scillyoyggjarnar

*Tá tíggjumannafarið hjá runavíkingum um nakrar mánaðir skal til Scillyoyggjarnar at rógva kapp, verða teir ikki einsamallir føroyingar á ferðini*

JÁKUP MØRK

Seinastu tvey árini, hava Føroyameistararnir í rógving fyri tíggjumannafør verið á Scilly oyggjunum, har teir hava luttikið í stórari kapping.

Soleiðis verður eisini í ár, tá suverenu vinnararnir av Eysturingi fara til oyggjarnar, har teir seinasta ár fingu sera gott úrslit.

**Ikki einsamallir**
Hesu ferð verða teir tó ikki einsamallir á ferðini, tí sum skilst, so ætla kvinnurnar á Jarnbardi eisini at royna seg í tí slagnum av rógving, sum kappast verður í á Scilly oyggjunum.

Síðani báturi varð tikin í nýtslu, hevur manningin alla tíðina talst millum bestu kvinnumanningarnar í landinum, og fleiri ferðir hava tær verið bestar, tá stigini fyri árið er tald saman.

Seinasta ár var als eingin ivi, og eins væl og runavíkingarnir, fingu havnargenturnar av bláa bátinum fult stigatal.

Spennandi verður tí at vita, um Føroyar á komandi kappingini kunnu verða umboða í tveimum finalum, sjálvandi treytað av, at Eysturingur eins og seinasta ár vinnur sær pláss í finaluni

Fyri at tryggja sær, at útlitini fyri einum góðum úrsliti eru so góð sum gjørligt, hava genturnar longu verið og roynt serliga bátaslagið, sum róð verður við.

Peningur er sjávsagt eisini neyðugur til eina slíka ferð, og hesum partinum hava genturnar sjálvar syrgt fyri.



*Vónandi kunnu tær fegnast eins nógv á Scillyoyggjunum, genturnar á Jarnbardi*

# Bridgekappingar

*Bridgefeløgini kring landið eru sera virkin í hesum døgum, og nú eru aftu kappingar á skránni*

JÁKUP MØRK

Á hvørjum ári verður stór simultankapping innan bridge fyriskipað, og árið í ár er einki undantak í so máta. Bridgesambandið hevur júst sent út tíðindaskriv, har boðað verður frá hesi kapping, eins og steypakappingini.

**Føroya Bjór simultan**
Føroya Bjór Simultan verður nú leygardagin 22. januar.

Hetta er ein parakapping fyri allar Føroyar, har tey somu kortini verða spæld samstundis á teimum ymsu spælistøðunum.

Spælt verður í Klubbanum á Tvøroyri (tekning hjá Ásu Jacobsen, tel. 37 12 39) , í gamla skúla í Miðvági (tekning hjá Jákupi Egholm, tel. 33 35 42), í Matmøðrafelagshúsinum í Klaksvík ( tekning hjá Sámal Júst Dahl, tel. 45 58 68), í Lonini í Fuglafirði (tekning hjá Dia Jacobsen, tel. 44 42 70), og í Bridgehúsinum í Havn (tekning hjá Boga Simonsen, tel. 31 20 33).

Byrjað verður at spæla klokkan 10 fyrrapartin. Spæld verða í minsta lagi 28 spøl.

Í fjør tóku 54 pør lut í kappingini, og FBS væntar eina minst líka stóra luttøku hesa ferð.

Tað samlaða úrslitið fyri landið verður kunngjørt í bløðunum og í útvarpinum komandi viku. Tey, sum hava atgongd til internetið, kunnu síggja úrslitini á heimasíðuni hjá Havnar Bridgefelag (www.bridge.fo) so skjótt sum uppgerðin er liðug - helst seint leygarkvøldið.

**Steypakappingin**
Nú er eisini tíð at tekna seg til steypakappingina. Seimifinalurnar og finalan í steypakappingini verða seinast í mars mánaða. Hvussu tey innleiðandi umførini verða spæld, veldst um, hvussu nógv lið tekna seg. Seinasta freist at tekna lið til steypakappingina er 5. februar hjá Boga Simonsen, kappingarleiðara, á telefon 31 20 33 ella Marjun Restorff, telefon 31 91 42.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 120,
**Sp/f Erik, 530 Fuglafjør›ur.**

**Vi›tøkur broyttar:**
08.10.1999.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Kaj Eli Blábjørg, 665 Skipanes (forma›ur), Maria Blábjørg, 530 Fuglafjør›ur og Rigmor Johanne Sigga Jacobine Toftegaard, 530 Fuglafjør›ur.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Ólavur Krossteig Joensen, 665 Skipanes.
Innkomin sum stjóri: Kaj Eli Blábjørg, 665 Skipanes.
**Tekningarreglur:**
Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum.

Skráseting Føroya tann 18. januar 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 200,
**P/F Føroya Shell, 100 Tórshavn.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Jørn Webler, Fåborgvej 22, DK-4000 Roskilde (forma›ur).
Innkomin í nevndina: Lars Erik Clausen, Stenløkken 90, DK-3460 Birkerød (forma›ur).

Skráseting Føroya tann 18. januar 2000

Kristin Balle

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

fk

www.wenzel.fo

Sløkki- og neyðútgerð
• Brannslangir
• Slanguvognar
• Eldsløkkjarar
• Brannteppir
• Forbindsskáp
• Børir
Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

KEYP SUMMARDEKKINI NÚ
4 stk. alufelgur 7x15" 4x100
4 dekk 195.50x15
Prísur 5.900.-
Kunnu nýtast til t.d. Toyota, Opel, VW og aðrar.
P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo
Sosialurin - 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

TJÓÐVELDIS café
hóskvøldið í Mettustovu
Limafundur verður í Mettustovu hóskvøldið 20. jan. kl. 19.30.
Annita á Fríðriksmørk leggur fram um útbúgvingarmál
Nýggir limir kunnu tekna seg
SUÐURSTREYMOYAR TJÓÐVELDISFELAG

Reyði krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17⁰⁰ til 23⁰⁰
212380

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

SOSIALURIN er har tað hendir
-ver við frá byrjan!
2000
HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.
Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur
Tlf.:
Undirskrift:
☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.